## Russland eygleiða NATO

Russiska stjórnin er alt annað enn fegin um, at NATO skaql hava eina venjing í Georgia saman við georgiska herinum og hermonnum úr Serbia, Kasakhstan, Armenia og Sameindu Arabisku Emiratunum. Men nú hevur NATO svarað við at bjóða Russlandi at senda eygleiðarar til Georgia at fylgja við venjingini. NATO-talsmaðurin James Appathurai sigur, at Russland hevur ikki svarað innbjóðingini, men hann sigur seg vóna, at svarið úr Moskva verður játtandi. Venjingin í Georgia er frá 6. mai til 1. juni.

## Beindi fyri sær

David B. Kellermann, sum var virkandi fíggjarstjóri í amerikanska kreditfelagnum Freddie Mac, varð funnin deyður í heimi sínum í statinum Virginia gjáramorgunin. Hann hevði beint fyri sær. David B. Kellermann, sum var 41 ára gamal, tók við sum fíggjarstjóri í Freddie Mac, tá tað almenna yvirtók kreditfelagið í september í fjør. New York Times skrivar, at David B. Kellermann fekk 800.000 dollarar í bonus fyri stuttum. Tað var júst bonusskipanin, sum noyddi fleiri stjórar í amerikanska fíggjarheiminum at fara frá, tí fólk og politikarar hildu skipanina vera órímiliga.



# Eivør borðreiðir við list og tónleiki

**Leygarkvøldið 25. apríl kl 19.30 hevur Eivør Pálsdóttir konsert í Norðurlandahúsinum. Eftir konsertina verður myndlistaframsýning í dansistovuni, har umleið 10 av hennara málningum verða sýndir**

Klokkan 19.30 verður Norðurlandahúsið karmur um konsert við Eivør Pálsdóttir. Á pallinum saman við Eivør verða Benjamin Petersen á gittar, Mikael Blak á bass, og trummur/slagverk spælir finski Abdissa "Mamba" Assefa. Eivør hevur seinastu mánaðirnar arbeitt við einari nýggjari orkestur samanseting og við nýggjum programmi, og hon er beint nú afturkomin av væleydnaðari konsertferð í íslandi, har fyrstu konsertirnar við nýggja tilfarinum vóru hildnar. Konsertskráin er partvís samansett av tónleiki, ið er av fyrru fløgunum hjá Eivør, men inniheldur eisini nøkur nýggj løg. Í tíðindaskrivi frá Eivør, sigur hon, at nýggju løgini vóru sera væl móttikin av íslendsku áhoyrarum. Nú fáa føroyingar so ein forsmakk upp á, hvat ein komandi fløga fer at bjóða.

Hendan konsertin verður væntandi einasta konsertin í Føroyum fyribils. Tí Eivør verður burturstødd komandi tíðina, tá hon er upptikin á konsertferð. Hon verður altso ikki heima tá allir teir føroysku festivalarnir eru í summar. Næstu ferð Eivør verður at hoyra, verður í sambandi við útgávu av komandi fløguni.

Atgongumerki til konsertina fáast umvegis heimasíðuna hjá Norðurlandahúsinum www.nlh.fo, í Norðurlandahúsinum og á Kunningarstovuni.

### Eygu hugans

Aftaná konsertina letur upp myndlistaframsýning í dansistovuni í Norðurlandahúsinum við málningum hjá Eivør. Myndlistaframsýningin hevur fingið heitið "Eygu Hugans" og verða umleið 10 málningar við á sýningini. Í tíðindaskrivi sigur listakvinnan soleiðis um listaframsýning sína:

Tankin aftanfyri heitið er, at sjálvt um vit lata okkara eygu aftur, so eru altíð 100 onnur eygu opin.

Okkara tankar, stúranir, fortíð og framtíð. Alt sum vit eru og alt sum vit ikki eru. Sorg, gleði, kærleiki og dreymar. Eygu hugans eru altíð opin.

Ikki fyrr enn silvitni er á vatninum, kemur spegilsmyndin fram.

Sama er við huganum. Kunna vit lata eygu hugans aftur? "Eygu hugans" er ein sýning um at vera í ljósinum, sum vit øll eiga innan í okkum, og eg vóni, at onkur fær okkurt gott burturúr hesum. Um ikki annað, ein ljósan tanka.

Málningarnar hevur Eivør málað ígjøgnum seinastu fýra árini, teir flestu eru tó málaðir í fjør og í ár, og íblásturin til myndirnar kemur mest frá ymsum øðrum mentanum. Onkrir av málningunum eru málaðir á einum hotelkamarið í Canada, meðan íblásturin til fleiri av málningunum, eins og hugskotið til heitið á framsýningi, stavar frá eini ferð úr India.

Sjálv sigur Eivør, at tað at skifta frá tónleikinum til pensilin, gevur henni javnvág.

"Pensilin stuðlar tónleikinum og øvugt. Tá eg máli, fái eg meira íblástur til at skriva sangir. Hugflogið far veingir, og hugurin er fríður".

Myndirnar og nýggi tónleikurin eru skapt í sama tíðarskeiði og við sama íblástri, og myndheiti ganga aftur í tónleikinum.

## Sunnleif við nýggjum verki

**Sunnleif Rasmussen hevur skrivað eitt nýtt verk, Norðljómi til heiðurs. Verkið ber heitið Sól, og verður frumframført Flaggdagin í ítróttarhøllini á Eiði**

TÓNLIST
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Flaggdagin klokkan 19.00 fara tónar hjá blásarum, sangarum, gittarum og klaveri at ljóma í ítróttarhøllini á Eiði. Norðskála/Oyraskúli fer hendan dagin at vinda flaggið upp á fulla stong, og fer at hátíðarhalda sítt 40. skúlaár. Hetta er eisini árið, at tónlistaskúlin hjá Eiðis og Sunda kommunu, Norðljómur, hevur 20 ár á baki. Til hetta høvið hevur Sunnleif Rasmussen skriva verk til skúlarnar sum nevnist "Sól". Tekstin hevur Hans Andrias Djurhuus hevur yrkt "Har skínur sól á fjallatind" og "Sól er gull, hon gyllir hvønn teig". Vid hesum føgru orðum og tónum frá Sunnleifi Rasmussen fer barnakór og Eiðis ljómfelag at frumframføra hetta spildurnýggja verk.

Sunnleif Rasmussen, sum eisini dugir væl at orða seg, fer at siga frá um verkið. Hetta sólkvøldið verða eisini tvey sponsk verk spæld, ið Ferran Ferrer hevur skrivað, har tað eina er fyri barnakór og orkestur. Ragnar Olsen og Niels Midjord hava harumframt sett eitt gittarlið saman til konsertina, mannað við bestu næmingum hjá Norðljómi. Ungdómsorkestrið Norðljómur fer at spæla kend løg so sum Mamma Mia og Killing Me Softly, og Ann Kristin Hansen og hennara klaverboksarar fara at spæla summartónleik.